SORINSKRIVARIN
Í FØROYUM

Hin 1. september 2009 varð av Yvirútskiftingarnevndini í

**OU 1/2007:**
**Kæra av uttangarðsútskifting av Froðbiar bygd**

gjørdur soljóðandi

ÚRSKURÐUR:

Tann kærdi úrskurðurin er gjørdur av Útskiftingarnevndini tann 30. april 2007 og er kærdur av Kristin Michelsen og Thormann Vang.

Teir kærandi hava í kæruriti dagfest 27. juli 2008 og undir málinum ført fram, at Kambhagi fyri Heiman er fyri vanbýti í støðd í mun til hvussu stóran part av haganum teir eiga, og við at teir hava fingið so gott sum allan bakkan í haganum. Missurin vegna brattlendi er umleið 10-15 %. Afturat hesum kemur, at ogn teirra ikki eigur at býtast í tvey, Kambhagi fyri Heiman og Nípan, men skal verða ein hagi nevndur Botnskarðshagi. Einki ynski er hjá eigarunum um at býta hagan í tvey, og til at skula seta uml. 15.000 metur av nýggjum hegni upp. Harafturat eigur Hvannhagi at rekast sum ein hagi.

Harafturat hava Kristin Michelsen og Thormann Vang, aftan á at málið varð tikið upp til avgerð, við brævi frá 30. apríl 2009 gjørt galdandi, at §§ 25 og 26 í útskiftingarlógini ikki geva heimild til at broyta markatalið hjá eigarunum, ið, aftan á at útskifting er farin fram, skulu eiga sama tal av merkur og gyllin, ið teir áttu áðrenn. Alt annað er óheimilað ognartøka í andsøgn við grundlógina. Avgerðin hjá Útskiftingarnevndini hevur við sær, at eigararnir í Nípuni og Kambhaga fyri Heiman missa umleið 10 gyllin, svarandi til umleið 300.000-400.000 kr. í marknaðarvirði, til eigararnar, ið kravdu útskifting.

Jaspur Vang hevur vegna eigararnar í Kambhaga fyri Handan, sum hava sett fram ynski um útskifting, mælt til, at úrskurðurin hjá Útskiftingarnevndini verður staðfestur, og hava víst á, at teir hava fingið frábýttan haga, soleiðis sum upprunaliga ætlanin var, og at Kambhagi fyri Handan er lagdur oman fyri innangarðs ogn og íløgur teirra. Um úrskurðurin ikki verður staðfestur, krevir Kambhagi fyri Handan, at Kambhagi fyri Handan verður tillutaður størri vídd av lendi á suðursíðuni. Kambhagi fyri Handan og Líðarhagi Uttasti Partur hava fingið áleið eins nógvan óhøgligan, um ikki óhøgligari, bakka í sín part sum Kambhagi fyri Heiman. Tí er tað ikki rímiligt, um Kambhagi fyri Heiman verður tillutað størri vídd norðan til í Kambhagi fyri Handan.

Til tað, ið teir kærandi hava ført fram viðvíkjandi markatalinum, hevur Jas-

þur Vang vegna eigararnar í Kambhagi fyri Handan gjørt galdandi, at talan er um sjónarmið, ið vóru kend, áðrenn kærufreistir vóru úti, og ið ikki kunnu førast fram, langt aftan á at kærufreistin sambært § 55 í Útskiftingarlógin var úti, og aftan á at málið er tikið upp til avgerð. At talan er um ognartøku er beinleiðis skeivt. Hóast gyllintalið hjá einstøkum eigarum er lækkað eitt vet, er marknaðarvirðið á hvørjari gyllin hjá hesum eigarum hinvegin hækkað, og teir hava ikki haft nakað tap.

Útskiftingarformaðurin hevur hildið seg til úrskurðin hjá Útskiftingarnevndini og víst á, at uttangarðs brúkið í Froðbiar bygd alt er í kenning. Hetta setir serlig krøv til skipan av høgunum og forðing, tá seyðurin ikki er í haganum. Hagarnir mugu ikki verða ov stórir, hvørki í markatali ella eigaratali, tá vandin fyri at raksturin krevur ov nógva orku í mun til úrtøkuna og fyri ósemjum er størri. Útskiftingarnevndin hevur serliga lagt dent á, at eigararnir bert verða lagdir í ein haga, at einbýttu hagarnir verða varðveittir í størstan mun, at nýggju hagarnir kunnu rekast uppá ein dag, og at allir hagarnir hava atgongd til innangarðs, so lættari er at flyta áseyðin til ognirnar, har eigarin eigur bitið alt árið. Býtisgrundarlagið er, at áseyðatalið er 2 á gyllin í øllum høgum uttan í Botnskarðshaga, har áseyðatalið er sett til 2,5 áseyð/gyllin. Fyri Handan Kamb og Heiman Kamb er ásett, at 8 áseyðir eru fluttir frá Handan Kamb til Heiman Kamb. Regulering av markinum millum Líðarhaga, Uttastapart, og Botnskarðshaga, verður vídd fyri vídd. Hvannhagi er býttur í tveir partar eftir markatali millum høvuðspartarnar í útskiftingarmálinum.

Viðvíkjandi spurninginum um markatalið hevur Útskiftingarnevndin í gerðabókini víst á, at "nýggja markatalið er roknað út frá áseyðatalinum. Tó er markatalið í Kambhaga fyri Heiman og í Nípuni ásett soleiðis, at til ber at makaskifta gyllin fyri gyllin millum hesar hagar".

Í skrivi frá Umhvørvisstovuni frá 3. juni 2009 verður sagt, at "býtt er v.ø.o. eftir áseyðatali og ikki gyllin fyri gyllin. Hetta er gjørt, tí tað gongur ikki sama tal av seyði upp á gyllin í øllum hagapørtunum, sum er við í útskiftingini. Tá nú eigarar verða fluttir millum hagapartar við ójøvnum áseyðatali upp á gyllinin, má markatalið hjá hesum eigarum broytast samsvarandi. Gera vit ikki tað, gongur ikki upp. Eigararnir skulu hava sama tal av seyði í sín part líkamíkið hvørjum haga, teir enda í. Markatalið hjá øllum eigarum er tí ikki tað sama eftir útskiftingina, sum fyri."

Víst er í hesum sambandi til, at tað undir uttangarðsútskifting fleiri ferðir er komið fyri, at markatalið hjá eigarum er broytt av tí at gyllinar eru fluttar úr einum haga í annan t.d. á Sandi, í Bø og Hvalba og á Kunoy.

Av málinum framgongur, at

áseyðatalið í Botnskarðshaga var 3,5 seyð/gyllin og í Kambhaga 3 seyð/gyllin" (pag. 2191 í gerðabók fyri Útskiftingingina) áðrenn útskifting, og at Útskiftingarnevndin í sambandi við útskiftingina hevur ásett, at býtisgrundarlagið skal vera 2 áseyðir á gyllin í øllum høgum uttan í Botnskarðshaga, har 2,5 seyðir eru á gyllin (pag. 2198 í gerðabokini).

Markatalið, fermeturtalið og áseyðatalið í hagapørtunum, áðrenn útskifting eru soleiðis

| | | | |
|---|---|---|---|
| Kambhaga | 192 áseyðir | 96 gl | 407 ha |
| Botnskarðshaga | 280 áseyðir | 112 gl | 373 ha |

tá ið býtisgrundarlagið er 2 áseyðir á gyllin í øllum høgum uttan í Botnskarðshaga, har 2,5 seyðir eru á gyllin.

Sambært úrskurðinum hjá Útskiftingarnevndini er býtt soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Líðarhagi uttasti partur | 120 áseyðir | 60 gl | 159 ha |
| Kambhagi fyri Handan | 122 áseyðir | 61 gl | 194 ha |
| Kambhagi fyri Heiman | 181 áseyðir | 76 gl | 311 ha |
| Nípan | 173,9 áseyðir | 73 gl | 231 ha |

Sambært gerðabókini pag. 2200 og 3083 skulu ogn og skuld gerast upp eftir gamla markatalinum.

Yvirútskiftingarnevndin hevur hildið útskiftingarfund tann 15. september 2008 og er í hesum sambandi farin í hagan saman við kærandi og eigarar umframt útskiftingarformannin og fólk frá Matrikulstovuni.

Eftirfylgjandi hava semingsroyndir verið. Yvirútskiftingarnevndin hevur í hesum sambandi móttikið semingsuppskot frá teimum kærandu við korti og øðrum skrivligum tilfari, umframt viðmerkingar til hetta við korti frá Jaspur Vang v.fl. eigarar í hagapartinum Kambhaga fyri Handan.

Undir yvirútskiftingarfundinum á staðnum tann 15. september 2008 hevur Margo Petersen sett fram ynski um at fáa atgongd til hagan frá sínum bøi.

<u>Yvirútskiftingarnevndin heldur:</u>

Hóast at kæran viðvíkjandi broyttum markatali ikki er ført fram rættstundis, hevur Yvirútskiftingarnevndin avgjørt at viðgera hesa kæru.

Staðfestast kann, at áseyðatalið á gyllin áðrenn útskiftingina ikki var tað sama í øllum hagapørtunum, og at tað tí ikki bar til at skifta fullkomiliga eftir markatali, gyllin fyri gyllin. Yvirútskiftingarnevndin heldur, at tað undir hesum umstøðum er í samsvari við útskiftingarlógina, at "nýggja markatalið er roknað út frá áseyðatalinum". Víst verður í hesum sambandi til §§ 25, 26 og 80 í útskiftingarlógini. Lagt verður harvið til grund, at hvør eigari við tí býtisgrundarlagi, ið brúkt er, fær sama tali av seyði eftir útskiftingina sum áðrenn. Í sambandi við viðgerðina í Yvirútskiftingarnevndin er einki grundarlag ávíst fyri at seta til víks tað meting, ið Útskiftingarnevndin hevur gjørt, tá ið býtisgrundarlagið var ásett.

Kæran, sum Yvirútskiftingarnevndin annars skal taka støðu til, snýr seg um, hvørt Kambhagi fyri Heiman í sambandi við úrskurðin hjá Útskiftingarnevndini er fyri vanbýti í støðd.

Sambært úrskurðinum hjá Útskiftingarnevndini hevur Kambhaga fyri Heiman fingið 4 ha fyri 1 gyllin, meðan Kambhagi fyri Handan hevur fingið 3,2 ha fyri 1 gyllin og Nípan 3,1 ha fyri 1 gyllin. Eigararnir í Kambhaga høvdu áðrenn úrskurðin hjá Útskiftingarnevndini 4,2 ha fyri 1 gyllin. Í

Botnskarðshagi var fermeturtalið 3,3 ha fyri gyllin.

Sambært úrskurðinum hjá Útskiftingarnevndini verður fermeturtalið til 1 áseyð í hagapørtunum Kambhaga fyri Heiman og Kambhaga fyri Handan stórt sæð tað sama (1,6-1,7 ha/áseyð). Áðrenn útskiftingina var áseyðatalið fyri Kambhagi 2,1 ha/áseyð og fyri Botnskarðshagi 1,3 ha/áseyð.

Sambært tí, ið er komið fram í málinum, metir Yvirútskiftingarnevndin, at hagaparturin Kambhaga fyri Heiman hevur fingið ein størri part av tí óhøgligara bakkinum og tí vánaligara lendinum enn Kambhaga fyri Handan.

Samanumtikið metir Yvirútskiftingarnevndin á tí fyriliggjandi grundarlagnum, og við atliti til, at fermeturtalið til 1 áseyð í hagapørtunum Kambhaga fyri Heiman og Kambhaga fyri Handan er stórt sæð tað sama í úrskurðinum hjá Útskiftingarnevndini, at rímiligt er, at hagaparturtin Kambhaga fyri Heiman fær størri vídd við tað, at markið millum hagapartarnar norðan til í Kambhaga fyri Handan verður flutt sum ásett á viðhefta korti, soleiðis at umleið 14 ha verða fluttir frá Kambhaga fyri Handan til Kambhaga fyri Heiman.

Í aðrar mátar verður úrskurðurin hjá Útskiftingarnevndini staðfestur.

Yvirútskiftingarnevndin er soleiðis samd við útskiftingarnevndini í, at hagarnir eiga ikki at verða ov stórir, hvørki í markatali ella eigaratali, og heldur tí, at rættast er, at Nípan og Kambhaga fyri Heiman ikki verða lagdir saman. Einki er tó til hindurs fyri, at hagapartarnir verða riknir saman, um so er at eigararnir, sum upplýst er, ynskja hetta, soleiðis at neyðugt tá ikki er at hegna millum hagapartarnar.

Yvirútskiftingarnevndin metir ikki, at grundarlag er fyri at broyta avgerðina hjá Útskiftingarnevndini viðvíkjandi Hvannhaga.

Yvirútskiftingarnevndin heldur ikki, at ynskið hjá Margo Petersen um at fáa atgongd til hagan frá sínum bøi gevur grundarlag fyri at broyta úrskurðin hjá Útskiftingarnevndini. Margo Petersen hevur ikki kært, og sambært tí fyriliggjandi hevur hann longu atgongd til hagan frá matr. nr. 722.

**Tí verður ásett:**

Úrskurðurin hjá Útskiftingarnevndini verður staðfestur við hesum broytingum:

Markið millum hagapartarnar Kambhaga fyri Handan og Kambhaga fyri Heiman norðan til í Kambhaga fyri Handan verður flutt sum ásett á viðhefta korti, soleiðis at umleið 14 ha verða fluttir frá Kambhaga fyri Handan til Kambhaga fyri Heiman.

Skiftið fær gildi í klipping 2009. Garðsskyldan fylgir við flutta markinum.

Málskostnaðurin, undantikið samsýningina hjá formanninum, sum verður goldin av landskassanum, verður goldin av landskassanum og felagnum við

hvør sínari helvt, alt eftir uppgerðini hjá formanninum, smb. § 59 í útskiftingarlógini.

Jógvan Nicodemussen

Óluva Jensen

Malan Vilhelm

Eyðfinnur S. Hansen

Henrik Møller

*Váttað avrit.*

*Tórshavn 1. september 2009*

Henrik Møller


Steinurin út fyri Urðini
Urðin á Steininum
Tøkan
Bjargamót
Ánatrom
Helmastimúli
Mosarók
Glógvin
á Heili
Olbisrók
Heygarnir
Rundheyggjur
Tippið
Hestagjógv
Glógvin Stóra
Staðna á Kossunum
Bustin
Glógvin
Handaragarði
Ginaskarð
Staraklettur
Akra-
leiti
Undir
Tollanskrógv
Grávurnar
Langabøkkarók
Flatið
Hestagjógv
236
281
347
154
386

